# KRINGVARP ELLA NÆRVARP!?
## Public service er lokaltíðindi í Havn

DÁVUR WINTHER





*Jóan Hendrik Winther Poulsen helt fyrilestur á bókasavninum um Torra - upprunan og siðir*

Setti meg áhugaðan at hyggja at Mentanartíðindunum í Kringvarpinum 2. mars; men gjørdist enn einaferð varðugur við, at hesi eru søgur um mentanar- og náttarlívið í Havn.

Í Fuglafirði hendi eitt stórt frambrot í mentanarheiminum – ikki tað varð tikið upp á tungu av Public service-statiónini.

### Nykurin í Fuglafirði

Í Fuglafirði hevði Frits Johannesen skrivað ein sjáldsama góðan leik við støði í søguni um Nykin, sum vit kenna hana. Við hepnum hugflogi hevur hann í hesum leiki funnið fram staðarnøvn og nøvn á persónum úr grannaumhvørvinum í Fuglafirði. Hetta er ein sangleikur, sum tónleikaliga er framúr.

– Men mest og best av øllum er, at hann er framførdur av einum 6. flokki! Og tey leika øll og syngja øll, sum høvdu tey ikki gjørt annað – Tó eru tey reinir amatørar. Júst her liggur frambrotið! Men tað tykist øðrum óinteressant...

Málsliga hevur leikurin dygd uttan tó at vera stívur í framførsluni av so ungum næmingum.

Í stuttum sagt hava vit her eitt leikkonsept við leiki og sangi av 6. floksnæmingum, sum má sigast at vera hendinga heppið á mentanarliga pallinum.

Hetta er ein fongur fyri restina av lívinum hjá hesum børnum at hava verið við til og, um rætt var atborið, so eisini fyri Fuglafjarðar Skúla – Frits hevur fingið góða hjálp frá Eyð Matras og Marjun Djurhuus at seta leikin upp og Róa Eliasen klaver, Tórhalla Justinussen gittar og Jónsvein Poulsen bass - Alt dygdar arbeiði!

Ein forkunnug listaframsýning lat eisini upp í Fuglafirði.

Men heldur tú at "Mentanartíðindini" í Kringvarpi Føroya tímdu at taka hetta upp á tungu?? – Nei, so eiðasørt!

### Torradagar í Klaksvík

Í Klaksvík høvdu tey eina heila viku, sum bleiv kallað Torravikan. Aðrastaðni er greitt frá, hvat hetta merkir, so tað skal eg ikki koma inn á her. Men tað er skjótt at koma eftir, at størsti partur av hesi viku hevði nógv við mentan at gera – so sum vit her norðuri eisini skilja mentan.

Ein sera fjøltáttað og rúgvusmikil skrá – í eina heila vika!

Men heldur tú, at "Mentanartíðindini" í Kringvarpi Føroya tímdu at taka hetta upp á tungu?? – Nei, so eiðasørt!

### "Mentanartíðindini" 2. mars

Hvat var so í "Mentanartíðindunum" 2. mars?

5 min. við tungmálmstónleikabólkinum SIC, ið greiddu frá virki sínum. Men mær kunnugt sleppur drotningin ikki at roykja í almenna rúminum. Eisini tingið og tingmenn hava tikið henda skilagóða tátt upp. Í innslagnum við SIC varð ein spurdur, meðan fýra royktu upp á skift. So nógv, at tað líktist meir Smyril í toku. Av somu grund fekk eg ov lítið við, hvat sagt varð.

5 min. við leikinum um Maxim Gorkij

5 min. við Rithøvundafelagnum

2 min. við mótasýning

Í sjónvarpshøpi eru 5 min nógv sum innslag – Haldi, at "Mentanrtíðindini" kundu unt Nykinum í Fuglafirði 2 min. Somuleiðis hevði tað ikki verið ov nógv, um tey brúktu aðrar 2 min. upp á eina heila viku úr Klaksvík við mentan – Torradagarnir.

Men kanska er hesin partur av fiskivinuni ikki mentan??

### Kringvarpsgjaldið

Eftir hesa viðferðina, sum tíverri ikki er tann fyrsta av slagnum, havi eg hug at halda, at kringvarpsgjaldið kundi verðið heintað frá havnarfólki, meðan vit ómentaðu fingu somu upphædd í stuðuli fyri at hyggja eftir Havnartíðindum og annars mentanartíðindum úr Havn. Á henda hátt kundu vit kanska blivið eitt sindur mentaði her norðuri í myrkrinum.

Og tá ið vit eru so býtt at reagera upp á hjálparloysið úr høvuðsstaðnum, so verða vit kallaðir lokalir!

Lokalir – vit gera bert vart við, at nakað hendir norðan fyri Tórgarð, sum kanska ein suðuroyingur ella heimasandsmaður kundi havt áhuga í. Men hann fær tað ikki at vita – tí Mentanratíðindini hjá Public service statión Føroya skilir ikki, ella ger sær ikki far um, hvat sker uttan fyri eingjagarðarnar.

Tó skal "Góðan Morgun Føroyar", sum fekk ákoyringar herfyri, fyri ikki at vera nóg seriøs sending í eini Public service støð, hava rós fyri at hava víst Torradøgunum góðan ans!

Hetta er kanska alt afturundirgerð í kjalarvørrinum av miðsavningarrákinum, sum land okkara er fyri í dag.

Til kunnleika sigst virka og vinna o.u. 160 fólk í samlaða fjølmiðlaheiminum í Tórshavn. Haldi, at í Klaksvík virka eini 3 ella 4 innan hetta sama yrkið.

Tí kundi kanska ein partur av miðlaheiminum ella Kringvarpinum verðið fluttur til Klaksvíkar, nú tað er vorðið "in" at flyta stovnar.

Ikki tí, vit hava tað gott - og tað hendir nógv her norðuri!

| Mánadagin | | |
|---|---|---|
| 10.00-17.30 | Leikalund | Framsýning av myndum/fiskireiðskapi í Leikalund (Forngripasavnið sýnir) |
| 10.00-17.30 | Leikalund | Listaframsýning við Hedvig Johansdóttir |
| 11.30 | Klingran | Fiskarættur frá Jórun |
| 13.00-16.00 | Snørisvirkið | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 13.00-16.00 | J.F.Kjølbro Heilsøla | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 16.00-18.00 | Dragin | Opið skip. "Hvat og hvussu læra næmingarnir sjómansskap umborð?" |
| 18.00 | Atlantis | Eldri filmur "Blåvand melder storm" |
| 19.30 | Bókasavnið | Jóhan Hendrik W. Poulsen heldur fyrilestur um Torra – upprunan og siðir |
| 20-21.30 | Svimjuhøllin | Bert atgongd fyri kvinnur (lívverjar kvinnur) |
| 20.00 | Skúlin við Ósanna | Sjónleikurin - v/Maria Grube Marita Dalsgaard saman við øðrum yrkisleik |
| 21.00 | Atlantis | Fyrilestur v/Regin Reinert - Fíggjarligt gott veiðitrýst |
| 22.00 | Atlantis | Eldri filmur "Blåvand melder storm" |

| Týsdagin | | |
|---|---|---|
| 10.00-17.30 | Leikalund | Framsýning av myndum/fiskireiðskapi í Leikalund (Forngripasavnið sýnir) |
| 10.00-17.30 | Leikalund | Listaframsýning við Hedvig Johansdóttir |
| 11.30 | Klingran | Fiskarættur frá Jórun |
| 13.00-16.00 | Snørisvirkið | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 13.00-16.00 | J.F.Kjølbro Heilsøla | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 16.00-18.00 | Dragin | Opið skip. "Hvat og hvussu læra næmingarnir sjómansskap umborð?" |
| 16.00-20.00 | Føroya Húsarhaldskúli | Hondarbeiðframsýning, cafe - opið hús |
| 19.00 | Atlanis | Høgni Debes heldur fyrilestur um Gróður á Havsinsbotni |
| 19.30 | Bókasavnið | Bókakvøld, har tosa verður um skaldsøguna "Sólstormur" hjá Åse Larsso |
| 21.00 | Atlantis | Eldri filmur "Blåvand melder storm" |

| Mikudagin | | |
|---|---|---|
| 10.00-17.30 | Leikalund | Framsýning av myndum/fiskireiðskapi í Leikalund (Forngripasavnið sýnir) |
| 10.00-17.30 | Leikalund | Listaframsýning við Hedvig Johansdóttir |
| 11.30 | Klingran | Fiskarættur frá Jórun |
| 13.00-16.00 | Snørisvirkið | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 13.00-16.00 | J.F.Kjølbro Heilsøla | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 16.00-18.00 | Dragin | Opið skip. "Hvat og hvussu læra næmingarnir sjómansskap umborð?" |
| 19.30 | Atlantis | Ein soldátur - Anfinn Jacobsen saman við Aldubáruni |
| 22.00 | Atlantis | Eldri filmur "Blåvand melder storm" |

| Hósdagin | | |
|---|---|---|
| 10.00-17.30 | Leikalund | Framsýning av myndum/fiskireiðskapi í Leikalund (Forngripasavnið sýnir) |
| 10.00-17.30 | Leikalund | Listaframsýning við Hedvig Johansdóttir |
| 11.30 | Klingran | Fiskarættur frá Jórun |
| 13.00-16.00 | Snørisvirkið | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 13.00-16.00 | J.F.Kjølbro Heilsøla | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 16.00-18.00 | Dragin | Opið skip. "Hvat og hvussu læra næmingarnir sjómansskap umborð ! |
| 18.00 | Atlantis | Fyrilestur v/Bjarta Thomsen - Skynsamur fiskireiðskapur |
| 19.00 | Christianskirkjan | Skótaguðstænasta v/Magnus B. Jørgensen, sóknarpresti |
| 19.30 | Bókasavnið | Fyrilestur v/Andras Mortensen - Samfelagsmenningin og útróður í eldri tíð |
| | | Joensen greiðir frá miðum og ýtum - Søgusmettan |
| 20.00-22.00 | Svimjuhøllin | Froskast og venda við kajakum |
| 22.00 | Atlantis | Eldri filmur "Blåvand melder storm" |

| Fríggjadagin | | |
|---|---|---|
| 10.00-17.30 | Leikalund | Framsýning av myndum/fiskireiðskapi í Leikalund (Forngripasavnið sýnir) |
| 10.00-17.30 | Leikalund | Listaframsýning við Hedvig Johansdóttir |
| 11.30 | Klinglan | Fiskarættur frá Jórun |
| 13.00-16.00 | Snørisvirkið | Framsýning av fiskireiðskapi |
| 13.00-16.00 | J.F.Kjølbro Heilsøla | Framsýning av fiskireiðskapi |
| | Kl. Sjúkrahús - | |

*Ein fjølbroytt skrá var løgd fyri Torradagarnar í Klaksvík*

# Vend kanónini, Sjúrður Olsen!

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



At Sjúrður Olsen leggur borgarstjóran undir at viðmæla, at arbeiðspláss verða flutt úr Havnini, er at reingja sannleikan. Men hetta er so líkt fyri partar av Fólkaflokkinum, sum einsamallur eigur allan trupulleikan í vanlukkuliga Strandferðslumálinum.

Í farnu vikuni hevði eg eina stutta viðmerking til Sosialin um flytingina av Strandferðsluni, og har kann lesast svart upp á hvítt, at borgarstjórin »legg-ur dent á, at hann ikki jublar um, at kommunan missir arbeiðspláss, men er keddur um at kommunan missir arbeiðspláss«. Og eg kann leggja aftrat, at einamest eri eg keddur av, at fólk við familju og bústaði í kommununi nú standa til at missa síni arbeiðspláss.

Samstundis er tað ein veruleiki, at tá landsmyndugleikin umsitur mál og hevur tikið avgerðina, so fær Havnin ikki vart seg ímóti tí. Vanligt er jú í landspolitiska umhvørvinum, at um talan er um útlegging ella nakað negativt fyri Havnina, so standa øll saman um tað. Hetta er ein sannroynd, og hesum liva vit við dag og dagliga.

Nú veit eg sjálvandi ikki, um Sjúrður er farin undir at seta valagn upp á húkarnar, men tað er sera nógv, ið bendir á tann bógvin. Men hann tykist mær ríkiliga bragdligur, tá havt verður í huga, at tað var ein fólkaflokspolitikari, sum fluttu Skipaeftirlitið úr Havnini til sítt egna valdømi, og at tað nú aftur er ein fólkaflokspolitikari, sum flytir Strandferðsluna úr Havnini til sítt egna valdømi.

Tí sær tað nú út, sum at Sjúrður Olsen er farin at steina, sjálvt um hann situr í glashúsi. Og hóskiligt er helst eisini at minna hann á, at frægast man vera at sópa fyri egnum durum, áðrenn lagt verður eftir borgarstjóranum, sum verjir Havnina allastaðni, har hann hevur ávirkan. Sjúrður Olsen skal vera vísir í, at mín partur liggur ikki eftir, tá Havnin skal verjast, men verri man standa til við honum og hansara egnu í Fólkaflokkinum.

Leitast skal leingi eftir vánaligari politiskum handalagi enn tí, fólkaflokslandsstýrismaðurin við innlendismálum hevur havt í hesum máli, har hvørki starvsfólk ella álitisfólk á Strandferðsluni eru spurd eftir, áðrenn tilverugrundarlagið er skrætt undan teimum. Tað er Fólkaflokkurin, ið einsamallur eigur allan trupulleikan í hesum vanlukkuliga máli, so tí er tað at kasta torvmold í eyguni á fólki, um málið verður vent og snarað aðrar vegir, sum Sjúrður Olsen nú roynir at gera tað.

Fyri tað um eg unni suðuroyingum nøkur fleiri almenn arbeiðspláss og fegnist um royndir at menna oynna, so taki eg á ongan hátt undir við tí, sum er hent og gjørt í Strandferðslumálinum! Tað er bara soleiðis, at tá landsmyndugleikin hevur tikið hesa avgerð og sett hana í verk, vendist ikki aftur, og tí veruleika mugu vit liva við, um vit vilja tað ella ei. Her má sjálvt borgarstjórin melda pass!

Einki fegnist eg um ella mæli til, at arbeiðspláss verða tikin úr høvuðsstaðnum og sett aðrastaðni í landinum. Tá Sjúrður Olsen skýtur mær hetta í skógvarnar, er hetta ikki annað enn ein neyðarslig roynd hjá einum ørkymlaðum fólkafloksmanni at skylda upp á onnur. Øll duga at síggja, hvør flokkur stendur á odda, tá umræður at tøma Havnina fyri arbeiðspláss!

Tað sama kann sigast sum aftursvar til Høgna Mikkelsen, býráðslim, sum kemur goyggjandi aftaná, men hann er á so primitivum støði, at fleiri orð verða ikki brúkt upp á hann.

Tí eru míni ráð, at Sjúrður Olsen heldur vendir kanónini ímóti sínum egnu, um hann skal raka málið. Hann kann hóskandi leggja fyri við at tosa við sínar egnu floksfelagar, sum fyrst fóru við Skipaeftirlitinum og nú eisini fara við Strandferðsluni úr Havnini, tí tað er í Fólkaflokkinum, at hesir tankar verða fostraðir og framdir. Alt annað er leysakrút og uttanumtos!